# Pedagogar

## til Dagstovnin í Fuglafirði

Til stovuna undir Hamri verður søkt eftir 1 pedagogi 35 t. viku, at byrja 1. februar 2005.
Starvið er á stovu við 12 børnum í aldrinum 0–3 ár.

Til stovuna í Króki verður søkt eftir 1 pedagogi 40 t. viku, at byrja 1. februar 2005.
Starvið er á stovu við 12 børnum í aldrinum 0–3 ár.

Dagstovnurin er ætlaður 60 børnum og er stovnurin skipaður í tvey hús við eini barnagarðsstovu og eini vøggustovu í hvørjum húsi.

Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Juliannu Næs, leiðara, tlf. 225222 / 444940.

Um eingin pedagogur søkir starvið, kunnu hjálparfólk verða sett fyribils.

Umsóknir saman við avriti av prógvum og viðmælum skulu vera býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 12. januar 2005 kl. 10.00.

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella ongan at taka.

*Fuglafjørður 09. desember 2004*

**Fuglafjarðar býráð**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Tekniskt hjálparfólk í Nólsoy

Søkt verður eftir tekniskum "allround" hjálparfólki við bústaði í Nólsoy.

**Høvuðsuppgávur**
At hava umsjón og viðlíkahald av m.ø.:
- vatnleiðingum og gøtuljósum
- vegum og kloakkum
- kommunalu bygningunum
- havnaøkinum.

**Persónligar eginleikar**
Umsøkjarin skal hava viðkomandi útbúgving og/ella royndir, kunna arbeiða sjálvstøðugt, verða fyrikomandi, hava lætt við at samskifta og vera til taks tá á stendur.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett í januar 2005 ella eftir nærri avtalu. Starvið er eitt fulltíðarstarv, lønt eftir sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jens M. Poulsen, kommunustjóra ella Janus Isfeldt, starvsfólkaleiðara, tlf. 302010.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmogu 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 3. januar 2005.

SNARSKIVAN
www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Tekniskt hjálparfólk í Hesti

Søkt verður eftir tekniskum "allround" hjálparfólki við bústaði í Hesti.

**Høvuðsuppgávur**
At hava umsjón og viðlíkahald av m.ø.:
- vatnleiðingum og gøtuljósum
- vegum og kloakkum
- kommunalu bygningunum
- havnaøkinum

**Persónligar eginleikar**
Umsøkjarin skal hava viðkomandi útbúgving og/ella royndir, kunna arbeiða sjálvstøðugt, verða fyrikomandi og hava lætt við at samskifta og vera til taks tá á stendur.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett í januar 2005 ella eftir nærri avtalu. Starvið er eitt hálvtíðarstarv, lønt eftir sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jens M. Poulsen, kommunustjóra ella Janus Isfeldt, starvsfólkaleiðara, telefon 302010.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmogu 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 3. januar 2005.

SNARSKIVAN
www.torshavn.f

# Bókadeild Føroya Lærarafelags

## skrivar við hesum út kapping um at skriva spøkilsissøgu til børn

Endamálið er at vera við í stórari norðurlendskari bókarútgávu við nýggjum spøkilsissøgum, sum hava støði í gamlari frásøgumentan. Í savninum verða 8 norðurlendsk forløg umboðað við einari ella tveimum søgum hvørt.

Ætlanin er, at allir høvundarnir skulu hittast til eitt vikuskiftisskeið í Reykjavík saman við forleggjarum og fakfólki, har søgurnar verða viðgjørdar og betraðar. Listafólk úr ymisku londunum fara at myndprýða søgurnar við litmyndum, og bókin kemur út í øllum londunum samstundis.

Søgan skal vera fyri 9-12 ára gomul børn, í mesta lagi 10.000 sløg á knappaborðið. BFL letur eina ella tvær virðislønir á kr. 7.400,- men tilskilar sær eisini rætt til onga virðisløn at lata, um ikki verður hildið, at nøkur søga er virðislønarverd. Handritini skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi fríggjamorgunin 28. januar 2005 kl. 9.00.

Bókmentaliga nevnd Føroya Lærarafelags er dómsnevnd.

**Bókadeild Føroya Lærarafelags**
Pedda við Stein gøtu 9
100 Tórshavn
tlf. 317644, bfl@bfl.fo

## Toll- og Skattstova Føroya Stýrið

# Fyribilsskráseting 2005

Skal fyribilsskatturin verða rættur, mugu vit hava rættar upplýsingar um B-inntøku og frádráttir.

**B-inntøka**
B-skatturin í 2005 verður roknaður út frá teimum upplýsingum, tú hevur givið á sjálvuppgávuni 2003.

Er B-inntøkan broytt í 2004, verða broytingarnar tiknar við í fyribilsskattaskránna 2005.

**Frádráttir**
Hevur tú frádráttir, er neyðugt at upplýsa okkum um teir.

**DIS-skipanin**
Siglir tú, ella fert tú at sigla undir DIS-skipanini, eigur tú at boða frá hesum.

Hevur tú longu boðað frá, er ikki neyðugt at gera tað umaftur.

**Rættingar/fráboðanir**
Oyðublað til at rætta ella skráseta fæst á Toll- og Skattstovuni, í peningastovnum, á posthúsum, og kann verða heintað á heimasíðuni: www.tollskatt.fo

Tú ert vælkomin at fáa upplýsingar um, hvørjar skrásetingar vit hava um tíni skattaviðurskifti.

Argir, 8. desember 2004

**Sambært grein 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til**

# Umboðsmannaval

**í Sjúkrakassanum Fyri Skála Læknadømi tann 29. januar 2005.**

3 umboð fyri Sjóvar kommunu standa fyri vali.

Uppskot við minst 6 valevnum skulu vera sjúkrakassanum í hendi innan 22. januar 2005.

**Sjúkrakassi Skála Læknadømis**
490 Strendur · Tlf. 449212

# JÓLAAFTAN Í KFUK

Vit eru nøkur, sum halda jólaaftan í KFUK. Eingin orsøk er til at sita einsamallur jólaaftan, so øll eru hjartaliga vælkomin at vera við, og hetta tiltak er ókeypis.

Jólahaldið byrjar klokkan 19.

Áhugað kunnu tekna seg og fáa nærri at vita hjá Sonju Klein, presti, tlf. 310 177.

**TILMELDINGARFREIST Á MIDDEGI 21. DESEMBER**